# Føroysk skip minni svartkalva í Grønlandi

**Í 2005 kunnu føroysk skip veiða 125 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi. Hetta er 25 tons færri enn seinasta ár**

SAMSTARV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og grønlendski starvsbróðurur hansara, Rasmus Fredriksen, umrøddu týsdagin samstarv millum Føroyar og Grønland á fiskivinnuøkinum.

Partarnir ásannaðu, at samstarvsavtalan frá 1997, sum tær árligu fiskiveiðiavtalurnar havt bygt á, er eitt hóskandi grundarlag fyri samstarvi millum londini.

### Minni svartkalvi

Landsstýrismenninir eru eisini vorðnir samdir um fiskiveiðiavtaluna millum londini fyri 2005.

Í vetur vóru samráðingar á embætismannastigi, og tá kravdi Grønland, at føroyska svartkalvakvotan í Vesturgrønlandi skuldi skerjast úr 150 tonsum niður í 100 tons.

Á fundinum, sum var í Grønlandi, eru landsstýrismenninir komnir ásamt um, at niðurskurðurin verður 25 tons – og ikki 50 tons - soleiðis at føroysk skip í 2005 kunnu veiða 125 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi.



*Flakatrolarin, Vesturvón, er eitt av skipunum, sum plagar at fiska svartkalva í Grønlandi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Kongafiskurin

– Á fundinum legði eg dent á týdningin, sum sínámillum samstarv millum Føroyar og Grønland hevur fyri bæði londini. Eg helt, at partarnir eisini eiga at ganga nýggjar leiðir, soleiðis at samstarvsavtalan frá 1997 kann víðkast til eisini at fevna um annað enn fiskivinnu, sigur Bjørn Kalsø.

Fiskimálaráðharrarnir úr Føroyum og Grønlandi fegnaðust um, at Føroyar, Grønland og Ísland sum strandalond hava staðið saman um at arbeiða fyri eini øðrvísi regulering av kongafiskinum í Irmingarhavinum.

– Komið er ikki á mál við nýggju skipanini enn, men vit eru ikki í iva um, at hetta er rætti vegurin fram, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevur verið í Grønlandi og fundast við grønlendska starvsbróðurin, Rasmus Fredriksen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Føroya Pedagogfelag fegnast:

# Umboðsmaðurin finst at Tvøroyrar kommunu og landsstýrismanninum

**Løgtingsins umboðsmaður hevur gjørt sína niðurstøðu í kæruni, sum Føroya Pedagogfelag reisti í samband við viðgerðina av málinum um leiðaran fyri frítíðarskúlan á Tvøroyri**



*– Tað skuldi ikki verið neyðugt at farið til løgtingsins umboðsmann við málum, har lógin er púra greið, heldur formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen, sum annars fegnast um niðurstøðuna hjá umboðsmanninum*

ÁTALA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen, sigur seg fegnast um úrslitið av kæruni, sum felagið fyri nøkrum mánaðum síðan reisti yvirfyri løgtingsins umboðsmanni í málinum um leiðaran fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Felagið avgjørdi at kæra Tvøroyrar kommunu og Hans Paula Strøm, landsstýrismann, fyri málsviðgerðina av hesum máli.

– Umboðsmaðurin hevur nú skrivað álit í málinum, og niðurstøðan er ein lemjandi ábreiðsla móti kommununi og landsstýrismanninum, sigur Jarvin F. Hansen.

### Ógildug setan

– Staðfest verður í álitinum hjá umboðsmanninum, at avgerðin um at seta annan umsøkjara enn lim okkara í starv var ógildug, og at málsviðgerðin hjá Tvøroyrar kommunu var so óforsvarlig, at umboðsmaðurin gevur kommununi eina sera álvarsliga átalu.

Jarvin sigur, at Føroya Pedagogfelag fegnast um nevndu niðurstøður.

– Hetta prógvar, at felagið hevði rætt í sínum sjónarmiðum. Hinvegin harmast vit um, at hvørki kommunan ella landsstýrismaðurin tykjast hava virðing fyri galdandi lóggávu.

Vegna Føroya Pedagogfelag heldur Jarvin F. Hansen tað vera burtur við, at neyðugt skal vera at fara til løgtingsins umboðsmann við tílíkum málum, har lógin annars er púra greið.

# Fiskapakkin lagdur á »ís« í vinnunevndini

**Fólkaflokkurin krevur, at útrokningargrundarlagið fyri fiskidøgum verður broytt, men Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, heldur tað ikki vera rætt soleiðis bara at broyta grundarlagið í einum fiskiári. Tí er ikki líkt til, at nógv umrøddi fiskapakkin kemur aftur úr vinnunevndini í bræði**

FISKAPAKKIN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann nógv umrøddi fiskapakkin, sum Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevur lagt fyri tingið, fór eftir fyrstu viðgerð í vinnunevndina, har hann hevur ligið í einar fjúrtan dagar ella so. Einki røkist í løtuni fyri, at málið kemur aftur úr vinnunevndini í bræði, tí Fólkaflokkurin krevur, at grundarlagið fyri útrokningum av fiskidøgum skal broytast, samstundis sum fiskapakkin verður samtyktur.

– Men tað vil eg ikki, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sum ikki heldur tað vera forsvarligt soleiðis uttan víðari at broyta útrokningargrundarlagið í einum fiskiári.

### Málið kannað

Um landsstýrismaðurin yvirhøvur er sinnaður at broyta grundarlagið, dugir hann ikki at siga í løtuni, men hann vil í minsta lagi hava at vita, hvørja ávirkan ein slík broyting kemur at hava fyri veiðitrýstið.

Ein bólkur situr júst og arbeiðir við hesum, men enn er hetta arbeiði ikki endaliga liðugt.

– Verandi skipan við fiskidøgum er grundarsteinurin undir fiskidagaskipanini, og tí haldi eg tað avgjørt ikki vera rætt, at hesin týdningarmikli partur bara verður broyttur við einum »pennatroki«.

Bjørn Kalsø veit ikki at siga, um fiskapakkin verður »afturhildin« í vinnunevndini, men hann heldur líkt verða til, at so er.

– Eg veit ikki, um vinnunevndin bíðar eftir tí arbeiði, sum er í gongd, men um so er, vænti eg ikki, at fiskapakkin verður endaliga samtyktur á løgtingi í hesi tingsetuni, sigur landsstýrismaðurin.

### Ein fiskidagur

Bjørn Kalsø sigur, at málið um útrokningargrundarlagið í stuttum snýr seg um, hvat ein fiskidagur er.

– Skipanin er hon, at tíðin telir frá tí, at skipið loysir, til lagt verður aftur í havn. Hevur skipið verið úti í eitt nú 26 tímar, telir hetta sum tveir fiskidagar, tí farið er út um teir fyrstu 24 tímarnar.

Hann sigur, at tað er hetta, sum hildið verður at vera órímiligt, og tað er faktiskt rætt.

– Men hetta hevur verið útrokningargrundarlagið øll árini, síðan vit fingu fiskidagaskipanina, og hetta grundarlag kunnu vit ikki broyta, tí vit kenna ikki avleiðingarnar til fulnar.

Bjørn Kalsø vísir á, at ávísir skipabókar duga væl at leggja sær til rættis, nær farið verður – og nær komið verður aftur í havn, soleiðis at fiskidagar ikki fara til spillis.

- Men tað eru ikki allir skipabólkar, sum eins væl kunnu leggja hesa tíðina til rættis, sigur hann.